# FORMANSSKAPUR DANSKA KONGS–RÍKISINS

*Grønland, Føroyar, Danmark*



Arctic Council

Chairship of the Kingdom of Denmark 2025–2027

Arctic Council

Chairship of the Kingdom of Denmark 2025-2027



Lívrunnin kavbátur - Avgustur

Mynd: Norris Niman - Visit Greenland



# *FORMANSSKAPUR DANSKA KONGS-RÍKISINS*

*Grønland, Føroyar, Danmark*

Londini í danska kongsríkinum eru Grønland, Føroyar og Danmark, hereftir tilskilað í felag sum formansskapurin.

Formansskapurin kennir tað sum ein heiður at stjórna Arktiska ráðnum fyri aðru ferð. Formansskapurin fer at virka fyri at varðveita Arktiska ráðið sterkt og virkisført, serliga til gagns fyri upprunafólkini og íbúgvarnar í Arktis, til tess at tryggja, at Arktis eisini frameftir er eitt øki merkt av støðufesti og samstarvi.

Aðalmálið verður ein fevnandi formansskapur, ið virkar í tøttum samstarvi við íbúgvarnar í økinum. Tað hevur alstóran týdning, at fólkið, ið býr í Arktis, hevur ávirkan á virksemið á leiðini, serliga hvussu burðardygg menning skal skiljast og styrkjast. Formansskapurin ásannar, at staðbundin vitan og framskygni eru týdningarmikil fyri at skilja og handfara broytingarnar í Arktis, og í arbeiðinum hjá ráðnum skal henda vitanin tí ganga hond í hond við vísindini.

Serligur dentur verður lagdur á at styrkja burðardygga menning í Arktis og búskaparliga myndugleikan hjá upprunafólkum.

Formansskapurin fer framhaldandi at stuðla verandi virksemi og verkætlanum í teimum seks arbeiðsbólkunum og serfrøðingabólkinum hjá ráðnum. Virkisskrá Arktiska ráðsins 2021-2030 (en. Arctic Council Strategic Plan 2021-2030), sum varð samtykt í Reykjavík í 2021, setur eina greiða arbeiðsætlan út í kortið fyri ráðið. Formansskapurin fer neyvt at fylgja hesi ætlan alt komandi formansskeiðið (2025-2027).

Formansskapurin fer framhaldandi at virka fyri tvørgangandi samstarvi og felags verkætlanum millum arbeiðsbólkarnar undir ráðnum fyri at menna nyttuna fyri øll og samlaða ágóðan av arbeiðinum.

Formansskapurin hevur raðfest fimm evni, ið endurspegla bæði raðfestingar hjá londunum í formansskapinum hvør sær, men sum samstundis eru í samsvari við nevndu virkisætlan. Hesi átøk eru:

*Upprunafólk og samfeløg í Arktis*

*Burðardygg búskaparlig menning og orkuskiftisloysnir*

*Havið*

*Veðurlagsbroytingar í Arktis*

*Lívfrøðiligt margfeldi*

Arktiska ráðið hátíðarheldur 30 ár í september 2026. Formansskapurin fer at virka fyri at styrkja ráðið fjórða tíggjuáraskeiðið og annars í tíðini, ið kemur.



# UPPRUNAFÓLK OG SAMFELØG Í ARKTIS

*Í virkseminum hjá Arktiska ráðnum hevur alsamt størri dentur verðið lagdur á burðardygga menning í Arktis. Formansskapurin fer eisini komandi formansskeið at virka fyri at styrkja luttøkuna hjá upprunafólkunum, og at fáa arbeiðið í ráðnum at brúka vitanina hjá upprunafólki.*

**Menna luttøkuna hjá upprunafólkinum í arbeiðinum hjá Arktiska ráðnum**
Formansskapurin skal tryggja upprunafelagsskapunum, ið eru fastir luttakarar (en. Permanent Participants) í ráðnum, ein sterkan og samvirkandi leiklut, við virknari luttøku og ráðgeving, tá ið avgerðir skulu takast í Arktiska ráðnum.

**Heilsutilbúgving og veitingarkervi**
Formansskapurin skal virka fyri tættari samstarvi um heilsutilbúgving í Arktis við tí fyri eyga at menna førleikarnar at fyribyrgja, handfara og fyrireika heilsuligar neyðstøður. Vit skulu samstarva við arktisku samfeløgini og menna tey til á haldgóðan hátt at kunna handfara óvæntaðar neyðstøður.

**Styrkja ungdómsluttøku í arbeiðinum í Arktiska ráðnum**
Formansskapurin fer at virka fyri at menna luttøkuna hjá ungdómum í Arktis í arbeiðinum hjá Arktiska ráðnum og stuðla tiltøkum hjá upprunafelagsskapunum til tess at økja og menna luttøkuna hjá ungdómum í ráðnum. Somuleiðis fer formansskapurin at bera arbeiðið víðari við teimum átøkum, sum Noreg hevur tikið til at raðfesta ungdómsluttøku í Arktiska ráðnum.

**Heilsa og sálarheilsa hjá upprunafólki**
Formansskapurin skal virka saman við øllum limalondum, føstum luttakarum og eygleiðarum í Arktiska ráðnum um eina heildartilgongd til heilsuna hjá upprunafólki.

Formansskapurin fer framhaldandi at stuðla arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum Sustainable Development Working Group (SDWG) at menna fólkaheilsutiltøk til frama fyri allar arbeiðsbólkarnar undir ráðnum. Vit fara somuleiðis at halda á at menna og stuðla verkætlanini Local2Global, íroknað átøk í beinleiðis samstarvi við upprunafólkið í Arktis til tess at varpa ljós á sálarheilsu, mátar at fyribyrgja sjálvmorði og styrkja trúnna á egnan mátt og megi millum tey ungu upprunafólkini og samfeløgini í Arktis sum heild.

**Styrkja arbeiðið fyri javnstøðu millum kynini**
Neyðugt er at styrkja javnrættindi millum kynini fyri at fremja javnbjóðis møguleikar og sosiala burðardygd í teimum arktisku samfeløgunum. Formansskapurin skal viðgera serstakar javnstøðuavbjóðingar í Arktis og ætlar at fylgja nøkrum høvuðstilmælum frá arktisku frágreiðingini Gender Equality in the Arctic, Phase 3, sum mælt varð til í yvirlýsingini í Reykjavík 2021, og stuðla undir arbeiðið hjá upprunafelagsskapunum í Arktiska ráðnum, sum viðvíkur javnstøðu millum kyn. Omanfyrinevnda frágreiðing staðfestir serliga tørvin at fáa til vega vantandi dátur um fráflyting millum ung, heilsu og lógarbrot, t.e. vavið á valdshendingum og skipaðum mismuni ímóti upprunakvinnum, sum er eitt grundleggjandi amboð til tess at fremja kynsjavnrættindi í Arktis.



Tveir dreingir veiða loðnu við steinum á strondini í Illorsuit í Grønlandi
Mynd: Mads Pihl - Visit Greenland



Norðlýsið yvir streymleiðingum frá vatnorkuverkinum uttanfyri Nuuk
Mynd: Mads Pihl - Visit Greenland

# *BURÐARDYGG BÚSKAPARLIG MENNING OG ORKUSKIFTISLOYSNIR*

*Íbúgvarnir í Arktis hava natúrligan og serstakan áhuga í virkseminum í Arktis og spurninginum um, hvussu burðardygg menning kann mennast á ein javnvigaðan hátt, við virðing fyri ymiskum livikorum og liviháttum í Arktis. Formansskapurin fer at leggja dent á burðardygga búskaparliga menning við tí fyri eyga at tryggja, at tað er fólkið í Arktis, ið gongur á odda fyri hesum átøkum til frama fyri fólkið í Arktis við serligum denti á upprunafólk.*

**Burðardygg búskaparlig menning**
Áherðsla á burðardygga búskaparliga menning er í samsvari við virkisskrá Arktiska ráðsins fyri 2021-2030. Formansskapurin fer undir at nágreina búskaparliga menningartørvin í arktiskum samfeløgum. Fyri at stuðla undir hesa raðfesting, verður dentur lagdur á burðardygga búskaparliga menning í økinum við tí greiða máli at tryggja, at átøk viðvíkjandi burðardyggari búskaparligari menning í Arktis verða framd í samsvari við teir karmar, sum arktiska fólkið ásetir fyri tað arktiska fólkið og soleiðis, at arktisku samfeløgini og fólkið í økinum fáa beinleiðis ágóða av átøkunum. Við støði í omanfyrinevndu meginreglum fer formansskapurin somuleiðis at leggja herðslu á verandi og framtíðar búskaparlig átøk og burðardygt búskaparligt samstarv við partar uttan fyri Arktis.

Átøkini skulu fevna um mong ymisk viðurskifti; frá siðbundnum arktiskum virksemi í sambandi við veiðu, fiskiskap, skógrøkt, landbúnað og djórahald til frálandavinnu, orkuskifti, námsvinnu og ferðavinnu. Átøk um búskaparliga menning skulu sum útgangsstøði skoðast úr einum norður-til-norður sjónarhorni, tó skulu átøkini ikki verða avmarkað til tað. Formansskapurin ætlar at skipa fyri eini verkstovu ella ráðstevnu fyri at skifta upplýsingar ímillum partarnar, styrkja sínámillum sambond, fáa hugskot um nevndu nágreining viðvíkjandi tørvinum á búskaparligari menning og framhaldandi menna hetta arbeiðið gjøgnum Arktiska ráðið.

**Sambinding við áherðslu á samskifti, flutning, vinnuvirksemi og handil**
Møguleikar fyri sínámillum sambandi millum arktiska fólkið og restina av heiminum eru avgerandi fyri vøkstri og einum burðardyggum Arktis. Sambinding millum upprunafólk og arktisk samfeløg byggir á samskifti, flutning, beinleiðis samstarv, vinnuvirksemi og handil. Fyri fólkið í Arktis er álítandi og ódýrt telesamskifti sostatt avgerandi fyri atgongd til veitingar uttaneftir og talgilda búskapin. Formansskapurin fer framhaldandi at leggja dent á betri sambinding við støði í áður gjørdum kortleggingum og loysnum.

**Økja kunnleikan til bláan lívfeingisbúskap**
Formansskapurin skal virka fyri, at bláur lívfeingisbúskapur (en. Blue Bioeconomy) gerst eitt meginhugtak í burðardyggu búskaparligu menningini av Arktis við áherðslu á skynsamari nýtslu og umsiting av tilfeinginum í havinum til tess at tryggja langtíðar búskaparligan ágóða, samstundis sum at margfeldið og heilsan í vistskipanum í havinum verða varðveitt. Hetta skal birta undir búskaparvøkstur, fleiri størv og umhvørvisliga burðardygd í sambandi við aling, íroknað taraaling, og aðra skynsama nýtslu av livandi tilfeingi í sjónum, umframt at geva góðar møguleikar fyri burðardyggari búskaparligari menning, granskingar- og vitanarsamstarvi.

**Stuðla orkuskiftisloysnum**
Fígging til orkuskiftisloysnir í Arktis er grundleggjandi fyri umhvørvisliga burðardygd, og gera allan munin fyri burðardygga menning av fjarskotnum samfeløgum í Arktis og til tess at minka um kolevnisútlát og dálkandi virksemi, um somu tíð sum hetta stimbrar búskaparvøkstur í økinum. Grundað á økta skipaferðslu og annað ídnaðarvirksemi í Arktis er neyðugt við nýggjari tøkni, íroknað Power2X. Formansskapurin skal halda fram at stuðla tílík tiltøk.



Taraaling í Kaldbaksfirði – (Ocean Rainforest)

# HAVIÐ

*Meginparturin av Arktis er hav, sum hevur alstóran týdning fyri fólkið og upprunafólkið í økinum, sum eru tongd at einum reinum havi sum lívsgrundarlagi og lívshátti. Áhaldandi hitavøkstur og minkandi havísur bindur okkum til at styrkja eftirlitið við gongdini og eyðmerkja orsakirnar til broytingarnar, og harvið bøta forsagnirnar og úrslitagóðu umsitingina av havumhvørvinum, sum er í broyting.*

**Altjóða havráðstevna**
Formansskapurin skal skipa fyri eini altjóða havráðstevnu, sum burturav snýr seg um sambinding millum lágarktiska og háarktiska havumhvørvið við áherðslu á avleiðingar fyri lívfrøðiliga margfeldið og ferðandi fiskasløg, avleiðingar av veðurlagsbroytingum, dálkandi flutningi og flutningi av invasivum djóra- og plantusløgum til tað háarktiska økið. Ráðstevnan skal eisini lýsa týdningin av burðardyggari umsiting fyri arktiska havumhvørvið og styrkja ábyrgdarfult eftirlit og umsiting av økinum. Endamálið er at skapa karmarnar fyri vitanardeiling og knýta saman siðbundna gransking við vitan hjá upprunafólki við tí atliti, at greina bestu mannagongdirnar. Havráðstevnan verður í samsvari við 'Ocean Decade' dagsskránna.

**Varðveitingartiltøk og amboð til økisráðlegging**
Formansskapurin fer at stuðla undir framhaldandi arbeiðið, til tess at útvega eitt yvirlit yvir verandi vav og fatan av staðbundnum og altjóða treytum, fyri at finna munadygg staðbundin varðveitingartiltøk gjøgnum sonevnda OECM (Other Effective Area-Based Conservation Measures).
Hetta arbeiðið hevur við sær vitanardeiling millum arktisku londini um royndir við og nýtslu av OECM. Formansskapurin skal eisini finna hættir at menna amboð til umsiting av havleiðunum í Arktis, ið kunnu veita kunning til staðbundin og millumlandasamstørv í sambandi við fyrisitingar- og varðveitslutiltøk. Hetta virksemið fevnir m.a. um arbeiði við vistskipanargrundaðari fyrisiting (en. ecosystem-based management).

**Hóttanir móti havvistskipanum og upprunafólki**
Luft- og havborin dálkingarevni so sum per- and polyfluoroalkyl substances, nevnt PFAS, persistent organic pollutants, nevnt POP, og kyksilvur hótta ta viðbreknu arktisku vistskipanina, djóralívið og heilsuna hjá fólkinum, heruppií upprunafólkið í Arktis, sum er bundið at einum reinum havumhvørvi og føði frá havsúgdjórum. Vit skulu halda fram at viðgera hesar hóttanir fyri betur at skilja vavið og týdningin av hesum dálkingarevnum bæði í Arktis og kring allan heim.

**Styrkja samstarv um tilbúgving og skipaferðslu í Arktis**
Vaksandi skipaferðslan í Arktis økir vandan fyri óhappum og dálking í havinum. Formansskapurin fer at skipa fyri eini verkstovu fyri at umrøða eldri tilmæli um tilbúgving í sambandi við ferðamannaskipaferðslu í Arktis til tess at meta um verandi møguleikar at handfara tílíkar støður, framtíðartørv og vitanarglopp fyri at bøta um tilbúgvingina í arktisku londunum við ískoyti frá vitanini hjá upprunafólki.

**Undirsjóvaróljóð í Arktis**
Havumhvørvið verður alsamt meiri hótt av ljóðdálking í sjónum frá skipaferðslu og kanningarvirksemi. Formansskapurin fer at raðfesta arbeiðið, sum er í gongd, til tess at skilja ávirkanina og eyðmerkja stýringsamboð í samsvari við vistfrøðigrundaða fyrisiting.

**Mikroplast og annað burturkast í sjónum**
Formansskapurin skal virka fyri eini umfatandi eftirkanning av, hvussu økisverkætlanin um mikroplast og annað burturkast í sjónum í Arktis – Implementation Plan for the Regional Action Plan on Marine Litter including Micro-plastics in the Arctic – verður greidd úr hondum.



Rannsóknarskipið, Jákup Sverri, ið Havstovan rekur
Mynd: Ólavur Frederiksen

# *VEÐURLAGSBROYTINGAR Í ARKTIS*

*Veðurlagsbroytingar í Arktis henda við nógvari ferð, og mett verður, at hitavøksturin í miðal økist upp í tríggjar ferðir skjótari í Arktis enn í heiminum sum heild. Úrslitið er, at íbúgvarnir í Arktis eru millum tey fyrstu at kenna tær umfatandi avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum. Umhvørvi, lívsgrundarlag, siðvenjur og trivnaður hjá upprunafólkinum og samfeløgunum í økinum verða ávirkað ógvisliga. Ungdómurin skal arva okkara jørð, og tað leggur eina avgerandi ábyrgd á øll ættarlið. Veðurlagsbroytingar hava ávirkan á øll granskingarøki hjá Arktiska ráðnum við tvørgangandi avleiðingum fyri lívfrøðiliga margfeldið, vistskipanirnar og samfeløgini í Arktis. Formansskapurin fer at varpa ljós á gongdina í veðurlagsbroytingunum og ávirkanina, sum tær hava á burðardygga menning í Arktis.*



**Lýsa veðurlagsbroytingar og teirra ávirkan**
Áhaldandi arbeiðið at máta og skjalfesta lívfrøðiligu og fysisku broytingarnar í Arktis, ið eru bundnar at broytingum í veðurlagnum, skal raðfestast høgt. Hesar broytingar fevna millum annað um tiðnandi permafrost, bráðnandi havís, broytingar í lívfrøðiliga margfeldinum og vistskipanum, umframt umfatandi ávirkanina á upprunafólkið og arktisku samfeløgini. Hetta fevnir millum annað um fólkaheilsu og trivnað, mentan, lívsgrundarlag, búskap, undirstøðukervi, vistskipanartænastur og matskipanir. Í komandi formansskeiði skal ein dagførd frágreiðing um veðurlagsbroytingar í Arktis gerast.

**Ávirka dagskránna á øðrum staðbundnum og altjóða pallum**
Vit skulu stuðla styrktum samstarvi í Arktiska ráðnum og samstarvi millum ráðið og eygleiðaralond fyri at tryggja, at arktisk viðurskifti, herímillum viðurskifti hjá upprunafólkinum, verða tikin við í altjóða samráðingum um at bøta og laga til veðurlagsbroytingar, serstakliga í samráðingum undir UNFCCC.

Í okkara samskifti bæði úti og heima fer formansskapurin alt formansskeiðið at virka fyri, at rættindini hjá upprunafólkinum verða styrkt.

**Seta sjóneykuna á svart kolevni og metan**
Formansskapurin fer áhaldandi at savna seg um tað týdningarmikla arbeiðið við stuttlívaðum, veðurlagsdálkandi evnum, sum elva til ógvisligan hitavøkstur og heilsuskaða. Dentur verður lagdur á at varpa ljós á og vera forsprákarar fyri gagnligastu háttunum at skerja útlátið av svørtum kolevni (sóti) og metani.



Serstakt skap av bráðnandi ísfjalli um summarið
Mynd: Aningaaq R Carlsen - Visit Greenland

# *LÍVFRØÐILIGT MARGFELDI*

*Síðan Arktiska ráðið varð stovnað, hevur lívfrøðiligt margfeldi verið ein av høvuðsraðfestingunum.*
*Formansskapurin fer framhaldandi at virka fyri tí í samsvari við 2. endamálið í virkisskrá Arktiska ráðsins fyri 2021-2030, ið staðfestir, at vit skulu leggja dent á samstarv í øllum Arktis við tí endamáli at hava eftirlit við og meta um støðuna og gongdina við lívfrøðiligum margfeldi og vistskipanum í økinum soleiðis, at vit framhaldandi kunnu varnast og spáa um broytingarnar og veita bestu møguligu vísindadátur og vitan hjá upprunafólki.*

**Atgerðir til frama fyri lívfrøðiligt margfeldi í Arktis**
Formansskapurin skal ganga á odda í framhaldandi menningini av virkisætlanini fyri lívfrøðiligum margfeldi í Arktis (en. Action Plan for Arctic Biodiversity 2025-2035). Virkisætlanin vegleiðir og kunnar um arbeiði ráðsins um lívfrøðiligt margfeldi. Nýggja ætlanin eyðmerkir tey øki, sum dentur verður lagdur á, og er grundað á stevnumið, eyðmerkt í sonevnda Kunming-Montreal Global Biodiversity Framework, samstundis sum at serstaki arktiski samleikin, integriteturin og týdningurin verða varðveitt. Harafturat er nýggja ætlanin gjørd til tess at seta gongd á, at arbeiðið í Arktiska ráðnum gongur saman við viðkomandi altjóða skipanum, til dømis Intergovernmental Science-Policy Platform on Biodiversity and Ecosystem Services (IPBES).

**Trífalda heimsumfatandi kreppan – veðurlagsbroytingar, dálking og viknandi lívfrøðiligt margfeldi**
Formansskapurin fer at raðfesta trífaldu heimsumfatandi kreppuna við at skipa fyri tiltøkum undir formansskeiðnum frá 2025-2027 við tí atliti at viðgera lyklaspurningar til at handfara kreppuna. Tiltøkini skulu savna vísindafólk, politikarar, umboð fyri upprunafólk og óheftar felagsskapir (NGO) o.o. Í 2027 verða høvuðsboðskapirnir frá hesum tiltøkum viðgjørdir á eini ráðstevnu.

**Circumpolar Biodiversity Monitoring Program (CBMP)**
Netverkið Circumpolar Biodiversity Monitoring Program skal raðfestast frammarlaga til tess at styrkja altjóða netverk av vísindafólki, upprunafólki, stjórnum og friðingarbólkum, til tess at samvirka og samskipa tiltøk, ið hava til endamáls at hava eftirlit við lívfrøðiligum margfeldi í Arktis. Áherðsla verður løgd á at gera metingar og dagføringar til støðufrágreiðingarnar State of the Arctic Biodiversity Reports. Harumframt skal Formansskapurin stuðla menningini av nýggjum strategiskum leiðreglum fyri CBMP. Hetta fevnir um økt samsvar við kunningartørvin hjá heimligum og altjóða stovnum, fyritøkum o.ø. í sambandi við endamálini í Kunming-Montreal Global Biodiversity Framework.

**Økja um vitan til tess at handfara invasiv djóra- og plantusløg í Arktis**
Ein av størstu hóttanunum móti lívfrøðiliga margfeldinum bæði á sjógvi og landi eru invasiv djóra- og plantusløg. Formansskapurin fer at stuðla tað týðandi arbeiðið, ið virkar fyri at menna vitanarstøðið og eggja til skjótar og munagóðar atgerðir fyri at verja Arktis móti tílíkum invasivum djóra- og plantusløgum.

**Meginreglur um dátupolitikk og styrkt atgongd og viðgerð av dátum**
Fyri at gera tað léttari at finna og viðgera dátur fer formansskapurin framhaldandi at stuðla undir menningina av meginreglum um dátupolitikk, íroknað ræðið hjá upprunafólkinum yvir egnum dátum, til tess at leiðbeina um, hvussu dátur kunnu nýtast av stovnum undir Arktiska ráðnum. Formansskapurin tekur undir við átøkum at menna atgongd til brúkaravinarligar, dagførdar og álítandi lendisdátur til nýtslu í sambandi við eftirlit og kanningar og sum grundarlag undir ymiskum avgerðum.



# *Teir tríggir kóparnir*

**Búmerkið – Teir tríggir kóparnir**
Teir tríggir kóparnir umboða ikki eitt ávíst slag av kópi. Fleiri av teimum kópum, ið liva í og um arktiska økið, hava til dømis styttri lállur enn kópasløg sunnanfyri, og teir arktisku kóparnir eru serliga mentir at liva í ekstremum umstøðum. Hesar umstøður fevna millum annað um kalt vatn og kalda luft, sum ger, at ísurin leggur seg. Fyri summi kópasløg er tað avgerandi, at ísurin leggur seg, tí tey eru bundin av havísinum sum lívlendi, tá kóparnir skulu eiga sínar ungar.

Londini í danska kongsríkinum eru, sum kunnugt, Grønland (Kalaallit Nunaat/Nunarput), Føroyar og Danmark. Øll trý lond hava aðrar grannar enn hvønn annan, men havið bindur samstundis allar partar saman. Londini eru spjadd, men samstundis bundin saman. Í mínum huga verður hetta best myndað sum flyting í flokki ella ein familja á ferð inn í framtíðina - fram ímóti einum felags endamáli – eini betri framtíð.

Sambandið millum hesi londini hevur ein søguligan uppruna, ið stavar frá hjálandatíðini. Gjøgnum árini hevur søgan ment seg og við tíðini eru tað fleiri ymisk viðurskifti, ið knýta londini saman.



Miki Jacobsen
Mynd: Camilla Nielsen

**Puisi / Kópur**
At yvirliva í Arktis ræður í stóran mun um at hava servitan. Sum grønlendingur havi eg ofta undrast á, hví inuitmentan ofta verður lýst sum 'primitiv'. Hendan fatanin er serliga hugvekjandi, tá hugsað verður um, at vit hava megnað at yvirliva í Arktis uttan møguleika at trýsta á ein reyðan neyðknøtt fyri at fáa hjálp loftvegis ella sjóvegis, eins og tað sæst í sendingum, har fólk royna at yvirliva í náttúruni í 100 dagar. Vit vita, at flestu rannsóknarferðir í nýggjari tíð hava borið á mál, serliga orsakað av inuitvitan.

Í fleiri túsund ár hava inuittar búð í Arktis og ment hættir at veiða og flyta seg í truplum umstøðum. Serliga í myrku og køldu árstíðunum eru sermerktir hættir og sermerkt vitan neyðug. Kópaveiða var serliga umráðandi fyri inuittar. Veiðuamboðið – skutilin – er ikki tilvildarliga sniðgivin. Høvdið á skutlinum er sniðgivið á ein hátt, ið samantvinnar bæði virkisfør og andlig element, har sniðið og smálutir á skutlinum endurspegla skapið á einum kópi. Sambært fornari siðvenju tryggjaði hetta sniðið, at sálin hjá kópinum ikki ræddist, tí skutilin ímyndaði ein annan kóp. Hendan sannføringin vildi vera við, at sálin hjá kópinum fór av tí sama at venda aftur í øðrum kópi, og harvið tryggja yvirlivilsið hjá menniskjum.

Tískil kann sigast, at kópurin var grundleggjandi fyri, at mínir forfedrar komu undan við lívinum. Kópurin gav mat, klæðir og olju til lampur.
Í dag er støðan ein onnur. Eins og aðrar mentanir, er ein grundleggjandi menning farin fram á nógvum økjum. Kópurin er ikki longur ein týðandi fortreyt fyri at yvirliva. Hóast tað, hevur hendan menningin ikki broytt okkara fatan av kópinum. Kópurin verður framvegis sæddur sum ein føðslukelda í einum umhvørvi, har landbúnaður hevur serstakar avbjóðingar.

**Grafiska arbeiðið**
Tekniska arbeiðið handan tey grundleggjandi elementini í mínum sniðið eru gjørd við pensli og blekki. Hetta er ein fornur arbeiðsháttur, nýttur av mongum fornum mentanum til at skapa grafisk úttrykk, hóast hesin hátturin er mentanarliga 'nýggjur' í Grønlandi.

Mítt høvuðsmál hevur fyrst og fremst verið eitt einkult grafiskt mál og at arbeiða við ljósum og myrkum tónum, og javnvágina millum hesar.

Pensilin gevur mær møguleika at vekja linjurnar og strokini til lívs við at skifta ímillum breiddina av strokunum á løriftinum. Í hesi tilgongd kunnu ymisk amboð verða nýtt afturat einum pensli – eitt nú turrir og vátir penslahættir, litbrigdi, tónar, o.s.fr.

Í míni tíð á Skolen for Brugskunst / Danmarks Designskole fekk eg eina djypri fatan av grafikki. Eg byrjaði tó longu at tekna, modellera og mála á ungum aldri av tí at pápi mín var dugnaligur teknari, málari og keramikari. Tískil hava útbúgving og royndir hóskað væl saman fyri meg tíðliga í lívinum. Eg haldi fram við at kanna og gera royndir við mínari list, og harvið varnast nýggj úttrykk við at blanda saman ymiskar arbeiðshættir.

Eg eri takksamur fyri mínar framúrskarandi lærumeistarar, eisini á Eqqumiitsuliornermut Atuarfik – ein listaskúli í Nuuk, Grønlandi í 1980'unum – og í mínum lestrarárum á Nova Scotia College of Art and Design í Halifax, Kanada.



Fiskistað við ísfjørðin í Ilulissat

Mynd: Aningaaq R. Carlsen

ARCTIC COUNCIL